# Runavíkar kommuna bjóðar øllum at vera vælkomin á

# E y s t a n s t e v n u 2 0 0 4

## Skráin 11.-13. juni

**Fríggjadagur 11. juni**

| | |
|---|---|
| 10:00 - 23:00 | Open by Night! Handlarnir í Handilsmiðdeplinum hava opið til kl. 23:00 |
| 17:00 - 23:45 | Pizzaria á Hotel Runavík er opið |
| 17:30 | Fótbóltur, Piltar NSÍ-B36 |
| 18:15 | Roysnið skipar fyri rennikapping fyri børn og vaksin á kaiøkinum. Avheintan av startnumrum við Runavíkar Timburhandil Tilmelding á heimasíðuni hjá Frælsum Ítrótti Føroya www.athletics.fo í seinasta lagi kl. 20.00 kvøldið fyri. |
| 18.45 | Børn -7 (f. 97-) renna 1/2 km |
| 18.55 | Børn -10 (f. 94-96) renna 1/2 km |
| 19.05 | Børn -13 (f. 91-93) og ung -17 (f. 87-90) renna 2 km |
| 19.05 | Vaksin renna 10 km |
| 19:00 | Tivoli letur upp á stevnuøkinum |
| 19:00 | Barnaundirhald við Trølla Pæturi, Ommuni og Angelu á stevnuøkinum |
| 19:00 | Barnatiltak við brandbilum, sjúkrabilum og politibilum verður á stevnuøkinum |
| 19:00 - 22:00 | GO-kart á kaiøkinum |
| 19:00 - 22:00 | Paintball á kaiøkinum |
| 17:00 - 22:00 | Vatnskutari, vatnskí og fallskermur á fjørðinum. Atgongumerki verða seld á kaiøkinum. |
| 19:00 | Stuttligar myndir fyri børn og vaksin kunnu takast á stevnuøkinum |
| 19:00 | Fótbóltur, 3. deild NSÍ-EB/Streymur |
| 20:00 | Mótasýning við dreingjum NSÍ á vegnum uttanfyri El-tænastuna |
| 20:00 | Café letur upp í Hæddini |
| 21:00 | Birgir og Jónsvein spæla og syngja á pallinum |
| 21:00 | Fótbóltsdystur millum NSÍ dreingir og pápar, sum allir eru gamlir 1. deildarleikarar |
| 22:00 | Opið hús í Berøa |
| 23:00 | Diskotek í Støkkhøllini |

**Leygardagur 12. juni**

| | |
|---|---|
| 08:30 | Fótbóltur, Undir skúlaaldur ( NSÍ - GÍ ) |
| 08:30 | Fótbóltur, Yngst 2.fl okkur NSÍ-EB/Streymur.B68-Skála |
| 08:30 | Fótbóltur, Yngst 1.fl okkur NSÍ-EB/Streymur.B68-Skála |
| 09:45 | Fótbóltur, gentur 10-12 ár NSÍa-GÍa. Fótbóltur, gentur 10-12 ár NSÍb-GÍb |
| 09:45 | Fótbóltur, pinkur NSÍa-EB/Str. |
| 09:45 | Fótbóltur, pinkur NSÍb-B68 |
| 10:30 | Fótbóltur, smápiltar NSÍa-B68a |
| 10:30 | Fótbóltur, smápiltar NSÍb-B68b |
| 11:00 | Fótbóltur, 4.deild NSÍc-KÍb |
| 12:00-14:00 | Hotel Runavík, Sjómansheimið hevur døgurða |
| 13:00 | Fótbóltur, NSÍa-Hba |
| 13:00-15:00 | Vatnskutari, vatnskí og fallskermur á fjørðinum. Atgongumerki verða seld á kaiøkinum. |
| 13:45 | Skrúðgonga frá Glyvra Skúla út á stevnuøkið |
| 14:00 | Stevnan verður sett av Jóhan í Kollafirði Nes Sóknar Musikkfelag spælir og Eystankórið syngur Aftaná letur Tivoli upp |
| 14:20 | Konsert við M'as Bluesband á stevnuøkinum |
| 15:00 | FM Kappróður |
| 15:00 | Listaframsýning í býráðshøllini við Tummas Olsen, Virgar Poulsen og øðrum ungum listafólki |
| 15:00 | El-bilar til børn 2-8 ár á Stevnuøkinum |
| 15:00 | Skótacaféin letur upp á stevnuøkinum |
| 15:00 | Fótbóltur, 4.deild NSÍb-KÍa |
| 15:00 | Loppumarknaður á stevnuøkinum |
| 15:00 | Stuttligar myndir fyri børn og vaksin kunnu takast á stevnuøkinum |
| 15:00-19:00 | Málningaframsýning í Gamla Handlinum í Saltangará við Jørgin Olsen |
| 15:00-19:00 | Bygdasavnið Forni hevur opið |
| 15:00-22:00 | GO-kart á kaiøkinum |
| 15:00-22:00 | Paintball á kaiøkinum |
| 13:00-15:00 | Vatnskutari, vatnskí og fallskermur á fjørðinum. Atgongumerki verða seld á kaiøkinum. |
| 17:00-22:00 | Vatnskutari, vatnski og fallskermur á fjørðinum. Atgongumerki verða seld á kaiøkinum. |
| 17:00-00:45 | Pizzaria á Hotel Runavík er opið |
| 17:30-20:30 | Hotel Runavík, Sjómansheimið hevur kalt borð. |
| 17:30 | Eftir kappróðurin verða steypini handað á torginum av Rodmundi Nielsen, borgarstjóra. |
| 18.00 | NSÍ - EB/Streymur, Landskappingardystur/Steypadystur. |
| 18:00 | Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri súkklukapping fyri vaksin |
| 19:00 | Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri súkklukapping fyri børn Bólkur 1: 1996-98 Bólkur 2: 1993-95 Bólkur 3: 1990-92 Ungdómar: 1987-89 Byrjað verður við Timburhandilin í Runavík. |
| 19:00 | Beinta og Jákup syngja og spæla á Stevnuøkinum |
| 19:45 | Blákross skipar fyri útimøti uttanfyri Sjámansheimið í Runavík. |
| 20:00 | Ungdómsmøti í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum. |
| 21:00-24:00 | Eystanstevnukonsert í Grótbrotinum við Høgna Lisberg, I Am og Týr. |
| 21:30-22:30 | Praise Explosion úr Kelduni. |
| 23:30 | Nes Sóknar Musikkfelag spælir á stevnuøkinum |
| 00:00 | Midnáttarsamkoma á stevnuøkinum. Eystankórið syngur og Diana Borgnýardóttir heldur røðu. Felagssangur og fýrverk. |
| 00:30 | Dansur verður í ítróttarhøllini - orkestrið verður lýst seinni. |
| 00:30 | X-rays spæla til gamlamannadans í Støkkhøllini |
| 01:00 | Opið hús í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum |

**Sunnudagur 13. juni**

| | |
|---|---|
| 11:00 | Guðstænasta í Glyvra Kirkju v/Meinhardi Bjartalíð sóknarpresti |
| 12:00-15:00 | Hotel Runavík, Sjómansheimið hevur døgurða |
| 13:00 | Smágentur NSÍ-EB/Streymur |
| 14.00 | Felagið Seglið skipar fyri kappsigling á Skálafjørðinum. Bátarnir møta kl. 13.00 |
| 14:30 | Gentur 14-17ár NSÍ-B36 |
| 15:00-22:00 | Vatnskutari, vatnski og fallskermur á fjørðinum. Atgongumerki verða seld á kaiøkinum |
| 15:00 | Tivoli letur upp á stevnuøkinum |
| 15:00 | Listaframsýning í býráðshøllini við Tummas Olsen, Virgar Poulsen og øðrum ungum listafólki. |
| 15:00 | El-bilar til børn 2-8 ár á Stevnuøkinum |
| 15:00 | Støkk hevur fi mleikaframsýning í ítóttarhøllini |
| 15:00 | Berøa hevur útimøti á stevnuøkinum |
| 15:00 | Loppumarknaður letur upp á stevnuøkinum |
| 15:00-19:00 | Málningaframsýning í Gamla Handli í Saltangará við Jørgin Olsen |
| 15:00-19:00 | Bygdasavnið Forni er opið |
| 15:00 | Skótacaféin letur upp á stevnuøkinum |
| 15:00 | Stuttligar myndir fyri børn og vaksin kunnu takast á stevnuøkinum |
| 15:00-22:00 | GO-kart á kaiøkinum |
| 15:00-22:00 | Paintball á kaiøkinum |
| 16:00 | Um viðrar vitjar Føroya Motorsúkklufelag á stevnuøkinum |
| 16:00 | Gott stevnubingo í Støkkhøllini |
| 17:00 | Magni Christiansen syngur og spælir. |
| 17:00 | Eystanstevnukabarett í Glyvra Skúla |
| 17:00-22:45 | Pizzaria á Hotel Runavík er opið |
| 17:30-20:30 | Hotel Runavík, Sjómansheimið, hevur kalt borð |
| 18:00 | Møti í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum |
| 18:00 | Evangeliskt møti í Berøa |
| 19:00 | Tiltøk á stevnuøkinum: togtogan, stafettkapping og posarenning |
| 21:00 | Kvøldseta við tónleiki, sangi og skemti í ítróttarhøllini |

**Mánadagur 14. juni**

20:00 Eystanstevnukabarett í Glyvra skúla

Sosialurin 341800

## Skráin fyri Pallin á Stevnuøkinum

**Fríggjadagur 11. juni**

| | |
|---|---|
| 19:00 | Tivoli letur upp |
| 19:00 | Barnaundirhald við Trøllapæturi, Ommuni og Angelu |
| 19:00 | Barnatiltak við politibilum, brandbilum og sjúkrabilum verður á stevnuøkinum |
| 21:00 | Birgir og Jónsvein spæla og syngja |

**Leygardagur 12. juni**

| | |
|---|---|
| 14:00 | Setanin |
| Kl. 13.45 | Fer skrúðgonga frá Glyvra skúla og út á stevnuøkið. Stevnan verður sett av Jóhann í Kollafirði. Nes Sóknar Musikkfelag spælir og Eystankórið syngur. |
| 14:20 | Konsert við M'as Bluesband og Tivoli letur upp |
| 17:30 | Eftir Kappróðurin handar Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, steypini á pallinum. |
| 19:00 | Beinta og Jákup syngja og spæla. |
| 21:30 | Praise Explosion úr Kelduni. |
| 23:30 | Nes Sóknar Musikkfelag spælir. |
| 00:00 | Midnáttarsamkoma Eystankórið syngur Diana Borgnýardóttir heldur røðu Felagssangur Fýrverk |

**Sunnudagur 13. juni**

| | |
|---|---|
| 15:00 | Tivoli letur upp |
| 15:00 | Berøa hevur útimøti |
| 16:00 | Um viðrar vitjar Føroya Motorsúkklufelag á stevnuøkinum |
| 17:00 | Magni Christansen syngur og spælur |
| 19:00 | Tiltøk á stevnuøkinum Togtogan (NSÍ fyriskipar) Stafettkapping (Støkk fyriskipar) Posarenning (Skótarnir fyriskipa) |



W W W . R U N A V I K . F O




# Felagið Høganes varðveitir FD 5 Høganes



*FD 5 "Høganes" kom til Føroya úr Íslandi og kallaðist tá "Skarphjeðinn". Hon hevur hoyrt heima á Tvøroyri, Sørvági og at enda á Skálafjørðinum*

**Høganes er bygd í Rye í Onglandi í 1885, og verður hon sostatt 120 ár komandi ár**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hin 4. juni í 2004 hevur Felagið Høganes 20 ár á baki. Felagið varð stovnað við tí endamáli at varðveita sluppina, Høganes, sum part av einum sjógripasavni.

Sluppin er varðveidd øll hesi 20 árini, men smátt gongur at fáa innivist fyri skipinum uppi á landi. Fyrstu trý árini nýtti felagið til at avmontera og seta í stand 100 ára gomlu sluppina, ið var tann seinasta í Eysturoynni.

FD 5 "Høganes" kom til Føroya úr Íslandi og kallaðist tá

"Skarphjeðinn". Hon hevur hoyrt heima á Tvøroyri, Sørvági og á Skálafjørðinum.

Síðan ístandsetingina hevur eitt fjølbroytt mentanarvirksemi verið umborð við eitt nú siðsøguligum framsýningum, listaframsýningum og alskyns konsertum. Haraftrat er skipið eisini nýtt til ymiskt felagsvirksemi og undirvísing í sjóvinnu.

"Høganes" er bygd í Rye í Onglandi í 1885 og verður sostatt

120 ár komandi ár.

# NSÍ-formaðurin bjóðar vælkomin



Vegna Nes Sóknar Ítróttarfelag fer undirritaði at bjóða øllum vælkomin á Eystanstevnu 2004.

Eystanstevnan er vorðin ein av teimum stóru summarstevnunum, og er hetta komið í lag við góðum samstarvi millum ítróttarfeløgini, skótar, mentanarfeløg og ikki minst Kunningarstovuni í Runavík og Runavíkar Býráð, tí stórt fyrireikingararbeiði er gjørt, áðrenn stevnan er vorðin veruleiki.

À Eystanstevnu er býurin ílatin til summartíðina við ljósi, fløggum, tónleiki og øðrum, sum hoyrir eini slíkari stevnu til, og verður veðrið gott, er nakað til øll at fara til, sær sjálvum at fegnast um.

Eingin loyna er heldur, at tiltøkini á stevnuni eru góð fíggjarlig íkøst til tað mentunar- og ítróttarliga arbeiði, ið fer fram í Runavíkar kommunu.

NSÍ skipar eisini fyri nógvum fótbóltsdystum á Eystanstevnu, sum vanligt og sum skráin eisini vísur. Høvuðsdysturin er sjálvandi 1. deildardysturin ímóti frændum okkara norðan av oynni nevniliga felagsliðið úr Sundalagnum EB/ Streymur. Sjálvandi verður øll orka løgd í at fáa øll stigini til høldar, soleiðis at NSÍ betrar sína støðu í landskappingini.

Um eina viku t.v.s. 19 juni leikar NSÍ intertoto dyst ímóti donskum superliga liði. Ì skrivandi stund vita vit ikki hvat mótstøðuliðið er, men tað kann fyri so vítt gera tað sama, mótstøðan verður ivaleysa stór, men felagið gleðir seg til hesa stóru uppgávu.

Týdningur av slíkum altjóða dystum hevur avgjørt sín týdning við á virðiligan hátt at umboða NSÍ, Runavíkar kommunu og ikki minst Føroyar.

Við hesum fáu orðum :"vælkomin á Eystanstevnu 2004"

**NSÍ**
**Jákup Mortensen, formaður**





